# Tíðaravmarkað starv sum útoyggjalærari í Kirkju-Hattarvíkar skúla

Hevur tú hug at royna teg sum útoyggjalærara, so er møguleiki at søkja tíðaravmarkað starv skúlaárið 2020-21 í Kirkju/Hattarvíkar skúla. Starvið verður sett frá 1. august 2020.

**Um starvið**
Í Kirkju/Hattavíkar skúla verða 2 næmingar, ein næmingur í 6. flokki og ein í 8. flokki. Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans. Hann undirvísir í øllum lærugreinum og hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans.

Útoyggjalærarin skal fremja gott samstarv millum skúla og heim og virka fyri, at næmingarnir trívast og fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum fólkaskúlalærari og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av prógvi, c.v. og øðrum skal verða Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **15. mai 2020**.

**Umsóknin verður stílað til:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti**:** ummr@ummr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja ella skriva til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044. t-postur: jenny@ummr.fo.

***Uttanríkis- og mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál, gransking og uttanríkismál. Harumframt umsitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og frítíðarvirksemi.*